## Funnu gomul vrak

Tá menn nú um dagarnar vóru í ferð við at grava út fyri einum hotelli í norska býnum Larvik, komu teir niður á leivdirnar av ikki minni enn tveimum skipsvrakum. Boð vórðu alt fyri eitt send eftir fornfrøðingum hjá Sjóferðslusavninum, og teir kundu rættiliga skjótt staðfesta, at talan er um leivdirnar av tveimum skipum, sum vórðu smíðað í 17. øld. Skipini, tvey farmaskip, eru úr eik, og tey hava verið millum 40 og 45 føtur long.



## Hækka skattin

Júst sum danska stjórnin hevur boðað frá skattalætta næsta ár, kunngera fleiri danskar kommunur, at tær fara at hækka skattin á nýggjárinum. Stjórnin og kommunurnar hava avtalað, at kommunurnar kunnu taka í mesta lagi 700 mió. krónur meiri í 2008 enn í ár við at hækka skattin, men tær kommunurnar, sum hava boðað frá skattahækking, ætla sær at taka 1,9 mia. krónur meiri næsta ár. 75 prosent av kommununum ætla sær at hækka skattin, sigur TV2.

# Havnar Róðrarfelag í fíggjarligum trupulleikum

**Nógv rok hevur verið í Havnar Róðrarfelag seinastu tíðina. Nú boðar nevndir frá, at limafundur verður fyri øllum limum og áhugaðum. - Ætlanin við limafundinum er, at nevndin kann fáa slætt borð, sigur Óli Svein Hansen, formaður**

KAPPRÓÐUR
*Tíðindaskriv*

Tí hevur felagið kallað limir saman til fundar leygardagin 8. september klokkan 15.00 at greiða limunum frá, hvat er hent seinastu árini í Havnar Róðrarfelag.

Havnar Róðrarfelag hevur verið í einum fíggjarligum aldudali seinastu nógvu árini.

- Nýggja nevndin í Havnar Róðrarfelag ætlar at fáa vent gongdini, soleiðis at Havnar Róðrarfelag aftur gert eitt gott felag. Felagið hevur eina strævna tíð fyri framman, tí bæði fíggjarliga og ítróttarliga hevur bilað seinastu árini, sigur Óli Svein Hansen.

Hann sigur, at nevndin vil fyrst og fremst hava, at limirnir fáa eina heildarmynd, hvat peningur felagsins er brúktur til seinastu árini. Alt hetta tekur tíð at fyriskipa, men nú er arbeiðið við at verða liðugt.

Nógv rok hevur verið seinastu tíðina í Havnar Róðrarfelag. Tað hevur longu verið boð eftir báðum eykalimunum, tí Rúni Persson er farin úr nevndini, og Magni Nielsen hevur boðað frá, at hann er farin í farloyvi frá nevndini í eina tíð. Nýggir nevndarlimir eru sostatt Sigtór Lützen og Anna Herup Høgnesen. Sigtór róði í ár við Ørvi, og Anna róði við Sílinum. Bæði hava róð nógv ár í Havnar Róðrarfelag og vunnið bæði nógvar róðrar og harvið FM-heiti.

- Eisini fáa limirnir at vita um framtíðarætlanir hjá Havnar Róðrarfelag. Nevndin ætlar at fyrireika seg væl til róðrarárið 2008. Havnar Róðrarfelag fyllir eisini 75 ár í ár, og ætlar felagið at hava stóra veitslu 27. oktober, sigur Óli Svein Hansen, formaður í Havnar Róðrarfelag.

# Bóðu danir um at gevast við blokkstuðli



*Konsertin í donsku sendihølunum liggur á heimasíðuni hjá dr í ljóði og myndum*

*Mynd: Skermprent dr.dk*

**Tá 200 í sambandi við sína konsertferð í Danmark vitjaðu í útvarpssendingini, bóðu teir 600.000 danir um, at gevast við at senda pengar til Føroya**

TÓNLEIKUR
*Niels Uni Dam*
*nielsuni@sosialurin.fo*

Føroyski punkbólkurin 200 er í hesum døgum á konsertferð í Danmark. Í kvøld spæla teir í Studenterhuset í Århus, og í gjárkvøldið hitaðu teir upp fyri norska rokkbólkin Skambankt í VEGA á Vesterbro í Keypmannahavn. Á hesum konsertum spæla teir fyri ímillum nøkrum hundra og nøkrum túsund áhoyrarum. Men á konsert síni mikudagin spældu teir fyri munandi fleiri. Tá var punkbólkurin gestur í sendihølunum hjá donsku útvarpsstøðini P3. Har teir vitjaðu sendingina ”De Sorte Spejdere”. P3 er nógv tann best umtókta danska útvarpsstøðin, og 200 spældu fyri 600.000 lurtarum. Danir sluppu at uppliva 17 føroysk punkt løg spæld uppá 20 minuttir, har var ikki so nógv fjas ímillum, men onkur boðskapur á donskum kom upp ímillum. Eftir eina brakandi og larmandi framførlsu nú bað Niels Arge Galán danir um at gevast við at senda pening til Føroya, við orðunum:

- PS, hold op med at sende penge til Færøerne!

Leingi hevur verið ætlanin, at føroyski punkbólkurin hevur skula spælt í sendingini. Tónleikurin hjá 200 verður javnan spældur í vælumtóktu seinnapartssendingini, og í eini sending í vár, bjóðaðu vertirnir føroyska bólkinum at luttakaa, og ætlanin var, at 200 skuldu spæla í sjálvari endasendingini, áðrenn summarfrítíðina, men henda sending varð avlýst vegna sjúku. Men nú eru De Sorte Spejdere aftur í luftini, og í sambandi við at 200 spæla í Danmark, sluppu teir at vitja í upptøkuhølinum. Konsertin við 200 liggur í ljóð og livandi myndum á heimasíðuni dr.dk.